Í Sortudíki 31. august 2016

Eik Banki
Yviri við Strond 2
Postboks 34
FO-110 Tórshavn

**Viðv. kæru til Kringvarp Føroya um sjónvarpssendingina "Skattamálið" – send 24. mai 2016 – sum eisini fevnir um onnur tíðindainnsløg við tilknýti til sendingina.**

Kringvarp Føroya hevur 20. juni 2016 móttikið eina kæru frá Eik Banka um sjónvarpssendingina "Skattamálið" og innsløg við tilknýti til sendingina. Kæran er umfatandi og telur 31 ítøkilig punkt. Eik Banki vil í kæruni vera við, at Kringvarp Føroya hevur brotið punktini 1.2, 3.2, 4.1 og 4.12 í leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið.

Vit hava valt at svara kæruni við fyrst at gera eina stutta lýsing av málinum sæð úr okkara sjónarhorni, herundir eisini um val og verju av heimildum/keldum. Síðani svara vit øllum 31 punktunum, og at enda gjøgnumganga vit ítøkiligu punktini í leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið, ið Eik Banki vil vera við, eru brotin.

**Niðurstøða**

Kringvarp Føroya hevur gjørt tveir faktuellar feilir, sum tó onga ávirkan hava á sjálvt málið. Fyrri feilurin er, at vit í sendingini "Skattamálið" referera frá einum nevndarfundi í juni 2014. Nevndarfundurin var í *august 2014*, men innihaldið tað sama. Seinni feilurin er, at vit í sendingini nevna, at innanhýsis grannskoðarin hevur sagt seg úr starvi. Tað kann geva hyggjarunum ta fatan, at tað bert er ein innanhýsis grannskoðari í bankanum. Soleiðis er ikki. Rættari hevði tí verið at sagt, at *ein av innanhýsis grannskoðarunum* segði seg úr starvi.

Vit hava rættað hesar báðar feilir í Degi og Viku 18. august 2016.

Vit meta ikki, at Kringvarp Føroya hevur brotið leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið. Somuleiðis meta vit, at Eik Banki hevur fingið møguleika at svara, hvørja ferð vit hava umrøtt málið. Eik Banki fær tí ikki viðhald í síni kæru.

**Málslýsing**

17. februar 2016 bórust tíðindini um, at Eik Banki hevði fingið skattafrádrátt á skeivum grundarlagi. Føroysku miðlarnir frættu um hetta álvarsmál í donskum miðlum. Yvirskriftirnar vóru ikki hissini. TV2 skrivar "Færøsk bank beskyldes gor at dræne landskasse med fradrag". Berlingske Business skrivar "Eik Bank

undersøges i betændt skattesag til 90 mio. kr." Tað kom undan kavi, at Fíggjarligt Støðufesti hevði sent føroyska fíggjarmálaráðnum eina frágreiðing, har ávarað varð um, at skattafrádráttur var givin Eik Banka á skeivum grundarlag. Ein frádráttur uppá næstan 100 milliónir krónur.

Kringvarpið tekur sjálvandi hesa søguna upp, sum danskir fjølmiðlar meta vera so álvarsama. Eik Banki og eigarin, TF-Holding, vórðu spurdir um teirra frágreiðing, og í samrøðu við Dag & Viku vístu bæði Súni Schwartz Jacobsen og Gunnar í Liða á, at Eik Banki einans hevði gjørt eftir niðurstøðuni hjá TAKS.

Í mars 2016 hevði Kringvarpið fingið innlit í innanhýsis skjøl úr Eik Banka, og skjøl, sum vórðu gjørd í sambandi við søluna av Eik Banka. Í hesum skjølum kom fram, at fyrsta nevndin og stjórnin fyri Eik Banka hevði útgreinað, at tapið á 500 milliónir krónur var farið fram í 3. ársfjóringi 2010. Tað vil siga, at tað kom greitt fram, at tað ikki var farið fram í Eik Banka Føroya, nýggja Eik Banka. Eisini kom fram í skjølum í sambandi við søluna, at grannskoðarin hjá Fíggjarligum Støðufesti, KPMG, hevði útgreinað, at ongir møguligir skattafrádráttir vóru í nýstovnaða bankanum. Hesi skjøl góvu tí ábendingar um, at nýggi Eik Banki burdi vita, at tapið hoyrdi til gamla bankan, og at nýggi bankin tí ikki hevði rætt til ein frádrátt.

Hetta var grundarlag fyri fleiri innsløg í Degi & Viku. Súni Schwartz Jacobsen var spurdur bæði av Jan Lamhauge og Svein Magnasyni um at gera samrøðu um hetta, men hann takkaði nei.

Í apríl 2016 fekk Sosialurin - og seinni eisini Kringvarpið - innlit í samskiftið hjá Eik Banka við TAKS. Í hesum samskifti kemur fram, at Eik Banki einans spyr TAKS um, um tapið á tær 500 milliónir krónurnar skal dragast frá yvir 1 ella 10 ár. Í samskiftinum letur Eik Banki ikki nakran iva vera um, at tapið – sum eina ferð var mett at hoyra til 3. ársfjóring 2010 – nú hoyrir til nýggja bankan. Hetta gevur greiðar ábendingar um, at TAKS ikki tók støðu á einum nøktandi grundarlagi. Fjølmiðlarnir fáa eisni innlit í skjøl, sum vísa, at bæði nevndarlimir og grannskoðarar frá byrjan hava víst nýggja Eik Banka á, at tað, sum bankin hevði gjørt í sínum sjálvuppgávum ikki var í tráð við galdandi lóggávu.

Eik Banki varð spurdur um eina viðmerking, og Súni Schwartz Jacobsen játtaði at vera við í Degi & Viku 15. apríl 2016. Her vildi bankastjórin vera við, at grannskoðararnir hjá bankanum høvdu ikki gjørt vart við, at teir ikki hildu, at bankin hevði rætt til ein skattafráttin fyrr enn í januar 2016, og tí var Eik Banki farin aftur til TAKS við málinum.

Eftir hetta vísti Kringvarpið á, at grannskoðararnir hjá Eik Banka, KPMG og Spekt, høvdu fleiri ár frammanundan víst á, at bankin neyvan hevði rætt til frádráttin. KPMG boðaði frá hesum í mars 2013 og Spekt í mars 2014. Eik Banki skrivar aftur eina rætting til fjølmiðlarnar, har bankin vildi vera við, at KPMG tók undir við tí, sum bankin hevði gjørt. Hendan rætting mátti tó takast aftur dagin eftir eftir boðum frá KPMG. Súni Schwartz Jacobsen var spurdur um viðmerkingar til hetta, men noktaði at svara.

Í mai 2016 sendi Kringvarpið sendingina "Skattamálið", sum tók saman um málið. Súni Schwartz Jacobsen var spurdur um eina samrøðu, men vildi enn eina ferð ikki gera samrøðu. Kringvarpið legði tó eina røð av skrivligum svarum frá bankastjóranum út á sína heimasíðu.

Í juni 2016 kom fram, at longu í oktober 2010 hevði TF-Holding á fundi við Fíggjarligt Støðufesti spurt, um tað fylgdu skattafrádráttir við einum møguligum keypi av Eik Banka. Fíggjarligt Støðufesti hevði svarað, at

tapini og skattafrádráttirnir lógu í gamla bankanum, og at hesir frádráttir tí ikki fylgdu viðyvir í nýggja Eik Banka (Eik Banka Føroya). Eik Banki var enn einaferð biðin um eina viðmerking, men takkaði nei.

Seinni í sama mánaði segði Odd Bjellvåg, fyrrverandi nevndarformaður í gamla Eik Banka, at TAKS hevði tikið eina skeiva avgerð, um TAKS metti, at tað sum fór fram í oktober 2010 millum hansara gamla felag og Fíggjarligt Støðfesti, var ein vanligur handil. Talan var um eina avhending eftir lógini um fíggjarligt støðufesti. Odd Bjellvåg segði, at tað var greitt, at tapini lógu í gamla bankanum, og hann var sjálvur stevndur eftir endurgjaldi fyri hesi tap.

Súni Schwartz Jacobsen vildi ikki gera nakra viðmerking. Nevndarformaðurin í TF-Holding, Arni D. Brattaberg, segði tó í Degi & Viku, at hann hevði fult álit á nevnd og stjórn í Eik Banka, og at bankin frá byrjan hevði handlað eftir ráðgeving frá Deloiette.

Søgan um skattamálið hjá Eik er ein søga, sum livir upp til øll vanlig tíðindavirði.  Hon er sera viðkomandi fyri almenningin, tí Eik Banki hevur fingið ein skattafrádrátt uppá næstan 100 milliónir krónur. Peningur, sum annars hevði verið farin til Føroya fólk umvegis landskassan. Ivi verður av øðrum sáddur um, hvørt bankin yvirhøvur hevur rætt til henda fradrátt. Ivin er so mikið stórur, at TAKS nú á øðrum sinni kannar, um frádrátturin er givin á haldgóðum grundarlag.

Vit hava, sum miðil, skyldu til at varpa ljós á hetta álvarsmál. Fjøldin hevur rætt til at verða kunnað, sum tað stendur í innganginum til leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið.

Eik Banki visir í kæruni á, at Kringvarp Føroya ikki hevur neyðuga innlitið í málið. At vit ikki hava neyðuga kunnleikan til at greina slík mál og enn minni til at miðla tað til Føroya fólk. Í hesum sambandi insinuerar Eik Banki, at Kringvarp Føroya bert hevur eina keldu, og tey nevna eisini kelduna við navni, Jørn Astrup Hansen. Vit taka frástøðu frá ógrundaðu pástandunum hjá Eik Banka. Okkara arbeiði er at savna vitan og miðla hana. Tað hava vit gjørt umvegis fleiri munnligar og skrivligar keldur. Tað er ikki krav, at journalistar skulu vera løggildir grannskoðarar fyri at kunna viðgera og miðla eina søgu sum skattamálið hjá Eik Banka. Harafturat hava vit fullan rætt og skyldu til at verja okkaru keldur við at lata tær vera ónevndar. Serliga í málum sum hesum, har keldurnar eru í vanda fyri at verða rættarsøktar fyri brot á tagnarskyldu og/ella á annan hátt kunnu verða revsaðar. Leiðslan í Eik Banka hevur fleiri ferðir víst á, at tað kann vera revsivert at tosa við miðlarnar í hesum máli. Eik Banki hevur ringt til løgregluna, tá Kringvarpið hevur tikið myndir uttan fyri Eik Banka yvir við Strond í Havn, og bankin hevur umvegis sín advokat, Jógvan Páll Lassen, roynt at hótt Kringvarpið til sleppa dekninginum av skattamálinum.

Í kæruni verður eisini víst á, at Eik Banki ikki hevur álit á journalistinum í Kringvarpi Føroya, Jan Lamhauge. Hetta ger bankin við at insinuera, at journalisturin er tengdur at høvuðskelduni, sum smb. Eik Banka er Jørn Astrup Hansen. Hesum vilja vit staðiliga vísa aftur. Vit hava í okkara viðgerð av hesum álvarsmáli savna inn nógva skrivliga og munnliga dokumentatión, sum er grundarlag undir miðlingini. At tað ikki hóvar Eik Banka at hetta kemur fram í ljósið, skal journalisturin ikki miskrediterast fyri. Eik Banki hevur fingið høvi til at svara fyri seg í hesum máli, men velur ikki at gera tað. Í staðin sendi Eik Banki okkum skrivlig svar, sum vit løgdu á heimasíðuna hjá Kringvarpinum í fullum líki. Tað ber snøgt sagt ikki til at taka skrivlig svar við í eina sjónvarpssending í fullum líki.

Eik Banki vísir eisini á, at myndaviðgerðin í sendingini er manipulerandi. Hesum vilja vit eisini vísa aftur. Dramaturgi er eitt púra nátúrligt og legitimt amboð í dokumentarismu. Journalistikkur er søguforteljing og søguforteljing er dramaturgi.

Kringvarpið skilir, at eisini Miðlahúsið er kært til fjølmiðlanevndina fyri teirra tíðindaflutning í hesum málinum. Tað er undrunarvert, at miðlarnir, sum vóru fyrstir við søguni, Berlingske Business og aðrir danskir miðlar, ikki eru kærdir fyri teirra tíðindaflutning. Tað er eisini merkverdigt, at donsku journalistarnir ikki verða miskrediteraðir á sama hátt sum føroysku journalistarnir.

**Tey 31 kærupunktini**

Vit hava valt at svara hvørjum kærupunkti sær. Hesi punktini eru einans úr sendingini "Skattamálið", sum var send í Kringvarpi Føroya 24. mai 2016.

**1. (0:13): Dulnevnd kelda greiður frá sínum motivum**

Tað hevur stóran týdning fyri hesa søguna at greiða hyggjaranum frá, hvørji motiv keldurnar hjá Kringvarpinum siga seg hava fyri at tosa við fjølmiðlarnar.

Tað er sera sjáldsamt, at fjølmiðlar fáa innlit í so nógv tilfar frá varskógvarum í vinnuni, serliga innan fíggjarheimin, sum í hesum førinum. At hoyra, hví keldurnar hava tikið eitt so víttgangandi stig, er sera viðkomandi fyri søguna.

Vit hava, sum miðlar, skyldu til at verja okkara keldur – eisini tær dulnevndu.

**2. (1:00): Forsíðan á Sosialinum, 15. apríl 2016**

Umrøðan hjá Sosialinum av skattamálinum hevur stóran týdning fyri søgugongdina í málinum, og tí er umrødda forsíðan viðkomandi fyri sendingina hjá Kringvarpinum.

Um Eik Banki vil kæra yvir eina forsíðu hjá Sosialinum, má kæran stílast til Miðlahúsið/Sosialin. Kringvarpið hevur onki redaktionelt vald yvir forsíðuni hjá Sosialinum.

Kringvarpið kann tó ikki fortrongja hesa forsíðuna - ella lata sum um, at hon ikki er til - tí hon hevur týdning fyri søguna um Skattamálið.

**3. (1.46): Lestur um, at tað eyðnaðist Eik Banka at fáa TAKS at játta sær ein skattafrádrátt**

Tað er eitt fakta, at tað eyðnaðist Eik Banka í fyrru viðgerðini hjá TAKS av skattafrádráttinum at fáa TAKS at játta sær ein skattalætta á næstan 100 milliónir krónur.

TAKS hevur tikið málið upp aftur til nýggja viðgerð og stjórin í TAKS, Eyðun Mørkøre, hevur greitt Kringvarpinum frá, at hendan seinna viðgerðin er heilt øðrvísi enn tann undanfarna. Í Degi & Viku 26. mai 2016 sigur Eyðun Mørkøre: "*Nýggir upplýsingar eru komnir fram. Ella í hvussu so er nýggj sjónarmið, sum ger tað, at vit taka málið uppaftur*".

Spurningarnir 1) - hvørt Eik Banki hevði rætt til skattafrádráttin, ella 2) - hvørt tað var Eik Banki ella Fíggjarligt Støðufesti, sum hevði havt tapið á eina hálva milliard krónur, vóru als ikki partar av fyrru viðgerðini hjá TAKS.

Kringvarpið heldur, at tað er sera undrunarvert, at hesir spurningar ikki vóru umrøddir av Eik Banka í samskiftinum við TAKS. Serliga tá hugsað verður um, at TF-Holding samtakið, líka frá tí at samtakið byrjaði at umrøða møguleikan at keypa Eik Banka, er blivið gjørt varugt við, at bankin ikki hevði rætt til hendan frádrátt, tí tapið lá hjá Fíggjarligum Støðufesti. Síðani hava bæði nevndarlimir og grannskoðarar gjørt bankan varugan við tað sama. Tí er tað undrunarvert, at hetta ikki var ein partur av viðgerðini hjá TAKS.

Um hetta av sær sjálvum merkir, at Eik Banki "lumpaði TAKS", soleiðis sum Eik Banki orðar seg í kæruni, kunnu onnur meta um. Men tað broytir ikki ta sannroynd, at setningurin í sendingini "Skattamálið" er sannur: "Tað eyðnaðist Eik at fáa TAKS at játta bankanum ein skattafrádrátt á næstan 100 milliónir krónur."

**4. (5.05): Lestur um, at málið bleiv tikið upp til nýggja viðgerð**

Talan er ikki um skeiva upplýsing. Tá skattamálið kom fram, tók TAKS málið upp til nýggja viðgerð.

Fyrsta skjalið í nýggju viðgerðini hjá TAKS er brævið frá Fíggjarligum Støðufesti til Fíggjarmálaráðið, sum var sent 29. januar 2016. TAKS hevur boðað Kringvarpinum frá, at Súni Schwartz Jacobsen ringdi til Eyðun Mørkøre 9. februar 2016 at biðja um ein fund. Tá var málið longu tikið upp til nýggja viðgerð hjá TAKS.

Tí er tað beinleiðis skeivt, tá Eik Banki førir fram, at tað vóru tey, sum fingu TAKS at taka málið upp til nýggja viðgerð. Eik Banki hevur hinvegin skrivað til Fíggjarligt Støðufesti við ábreiðslum um, at Fíggjarligt Støðufesti blandaði seg í føroysk skattaviðurskifti.

Annars so kemur tað heili tríggjar ferðir fram í sendingini, at Eik Banki á nevndarfundi avgjørdi, at tað var neyðugt at fara aftur til TAKS, tá grannskoðarin ikki vildi skrivað undir roknskapin – 36:30, 40:40 og 41:30.

Tíverri fyri Eik Banka gjørdi bankin so seint av, at tá Eik Banki endiliga vendi sær til TAKS, høvdu føroyskir myndugleikar longu fingið málið á borðið til nýggja viðgerð 11 dagar frammanundan.

Sostatt er ikki talan um skeiva upplýsing.

**5. (8:53): Forsíðan á Sosialinum, 15. apríl 2016**

Kærur um forsíður hjá Sosialinum eiga at verða stílaðar til Sosialin/Miðlahúsið. Sí punkt 2.

**6. (9.54): Dulnevnd kelda greiður frá sínum motivum**

Tað hevur týðning fyri søguna at hoyra frá dulnevndu keldunum. Sí punkt 1.

**7. (11.25): Lestur um, at bøkurnar hjá gamla Eik Banka ikki vóru gjørdar upp, tá bankin bleiv yvirtikin**

Talan er ikki um skeiva upplýsing.

Fíggjareftirlitið gjørdi eina uppgerð av *útvaldum* lánum í gamla Eik Banka, áðrenn bankin bleiv yvirtikin. Á nevndarfundi hjá gamla Eik Banka 17. september 2010 stendur *"Finanstilsynet havde bedt om 15 engagementer fra Eik Banki til at gennemgå inden mødet"*.

Tá var greitt, at tapini – serliga hjá Eik Banka í Danmark – vóru so stór, at Eik Banki hevði brúk fyri nýggjum kapitali ella mátti bankin yvirtakast av Fíggjarligum Støðufesti. Og tað hevði skund, um hetta skuldi gerast áðrenn Bankapakki 1 gekk út tvær vikur seinni.

Tá Eik Banki var um at vera yvirtikin, vóru endaligu tølini fyri *allan* bankan sostatt ikki komin. Vit hoyra í sendingini Gunnar í Liða greiða frá á tíðindafundinum 27. september 2010 á 11:30 í "Skattamálið": *"Sum Odd segði, so eru endaligu tølini ikki komin"*.

Á tíðindafundinum, 27. september 2010, eru fleiri aðrar útsagnir, sum greiða frá hesum við ymiskum orðingum.

Á heimasíðuni hjá Eik Banka stendur eisini ein endurgeving av eyka aðalfundinum hjá gamla Eik Banka, 7. oktober 2010. Á síðu 6 í hesi fundarfrágreiðing stendur:

*"Tað er ikki gjørd ein neyv virðismeting, men afturímóti er gjørd ein avtala um at regulera keypsprísin. (…) Hvørt tað verður ein regulering av keypsupphæddini til fyrimunar fyri Eik Banka P/F, ber ikki til at siga nú"*.

Upplýsingin í sendingin er tí røtt, meðan Eik Banki – enn einaferð – kemur við villeiðingum í kæruni.

**8. (11.34): Lestur um, at Fíggjarligt Støðufesti tók tap á seg og stovnaði ein nýggjan banka**

Talan er ikki um skeiva upplýsing.

Í síni kæru endurgevur Eik Banki sendingina skeivt, tá Eik Banki fær tað at ljóða sum um, at upplesarin hevur sagt, at Eik Banki rindaði fyri rokningar í gamla Eik Banka.

Í sendingini verður ikki sagt, at nýggi Eik Banki hevur rindað fyri rokningar í gamla Eik Banka. Í sendingini verður tosað um Fíggjarligt Støðufesti, sum tók tapini í gamla Eik Banka á seg, og stovnaði ein nýggjan banka.

Í sendingini verður sagt: *"Við sær í skjáttuni til Føroya hevði Fíggjarligt Støðufesti 2 milliardir krónur. Milliardirnar báðar skuldu nýtast til tvey endamál - at stovna ein nýggjan banka og at rinda rokningar í gamla Eik".*

Talan er ikki um skeiva upplýsing, men heldur, at Eik Banki hevur misskilt setningin.

**9. (12.22): KPMG orðaði skattligu treytirnar fyri Eik Banka**

Talan er ikki um skeiva upplýsing.

Tá tað verður sagt, at KPMG "orðaði skattligu treytirnar" skal hetta ikki tulkast sum um, at KPMG gjørdi føroysku skattalógirnar á økinum. Sjálvandi ikki. Orðingin skal skiljast i týdninginum "at seta orð á". Í hesum førinum, at KPMG í umrødda skjalinum setti orð á, hvørjar skattligar treytir vóru galdandi fyri Eik Banka.

**10. (12.49): Útgreining av skjalinum hjá KPMG**

Talan er ikki um skeiva upplýsing.

Tað er ikki soleiðis, at alt, sum ikki samsvarar við fatanina hjá núverandi Eik-leiðsluni, eru skeivir upplýsingar. Tað er ikki ein skeiv upplýsing, at onnur hava aðrar fatanir enn núverandi bankaleiðsla, og Kringvarpið kann ikki "rætta" teirra skjøl, soleiðis at tey samsvara við fatanina hjá Eik Banka.

Í hesum førinum verður tosað um skjalið, sum KPMG orðaði.

KPMG skrivar, at *"The tax basis for the acquired assets and liabilities should correspond to the values attributed to the assets and liabilities in the opening balance sheet of October 14th 2010"*.

Hetta merkir, at skattagrundarlagið hjá Eik Banka skal samsvara við virðini í byrjanarjavnanum 14. oktober 2010. Hvussu stórur eginpeningurin var sambært byrjanarjavnanum hjá Eik Banka, sæst á síðu 26 í almenna roknskapinum hjá Eik Banka fyri 2010/11, har tað stendur, at eginpeningurin 12. oktober var 1.486 mió. krónur.

At KPMG helt, at skatturin hjá Eik Banka skuldi roknast út frá virðunum sambært byrjanarjavnanum, og tí ikki tók undir við tí sum Eik Banki gjørdi, er ein sannroynd. Tað er blivið staðfest í fundarfrágreiðingum, sum Eik Banki hevur almannakunngjørt, og nevndarformaðurin í Eik Banka, Torben Nielsen, hevur eisini váttað hetta fyri Berlingske Business 17. februar 2016.

**11. (14.05:) Útgreining av frágreiðing frá fyrsta Eik Banka-stjóranum**

Talan er ikki um skeiva upplýsing.

Enn einaferð ber ikki til hjá Kringvarpinum "at rætta" í skjølum, sum onnur hava skrivað. Hetta vildi verið skjalafalsan.

Tað er eitt fakta (sum eisini er sjónligt í sendingini), at fyrsta Eik Banka-leiðslan sambært frágreiðingini "Eik í 2010" metti tapið á eina hálva milliard hoyra til "3Q 2010", tá gamli Eik Banki var virkin. Skyldurnar, sum Eik Banki Føroya yvirtók frá gamla bankanum, vóru 514 mió. krónur størri enn yvirtiknu ognirnar, og tí var eginognin sambært byrjanarjavnanum hjá Eik Banka Føroya 1.486 mió krónur.

Núverandi Eik Banka-leiðsla kann vera ósamd í, at tapið hoyrir til 3. ársfjóring, men tað broytir ikki tað fakta, at tað var fatanin hjá undanfarnu leiðslu, nevnd og grannskoðan við Jørn Astrup Hansen og Henrik Bjerre-Nielsen á odda. Hetta er tað, sum kemur fram í sendingini.

Kringvarpið vil harumframt leggja afturat – uttan at tað er beinleiðis viðkomandi fyri tað, sum verður sagt í sendingini "Skattamálið", sum Eik kærir um – at tað er skeivt, tá Eik Banki í sínum skrivligu svarum til Kringvarpið skrivar, at *"Jørn Astrup Hansen hevði ynski um at almannakunngerða frágreiðingina", "Nevndin skilti heldur ikki, hví niðurskrivingarnar vórðu fluttar frá 4. ársfjóringi 2010 til 3. ársfjóring 2010"* og *"Táverandi nevndarforkmaðurin mæti til ikki at nýta hesa uppgerð, uttan so at grannskoðanin hevði áteknað frágreiðingina"*.

Eik Banki roynir við hesum at geva Kringvarpinum ta fatan, at tað einans er Jørn Astrup Hansen, sum metti, at tapið á eina hálva milliard krónur hoyrdi til 3. ársfjóring, meðan hvørki nevnd ella grannskoðan vildi góðkenna hetta. Men hetta er ikki rætt.

Í nevndarfrágreiðingini fyri fundin 22. februar 2011 kemur fram, at *ein* nevndarlimur - ikki "Nevnd*in*", sum Eik Banki skrivar - undrast yvir, at tapini eru so stór í 3. ársfjóringi. Hesin nevndarlimur var umboðið hjá TF-Holding, Gunnar í Liða (sum tað eisini verður sagt í "Skattamálið"). Tað er heldur ikki rætt, at Jørn Astrup Hansen vildi almannakunngera frágreiðingina. Tað var nevndarformaðurin í Eik Banka, Henrik Bjerre-Nielsen, sum mælti til, at frágreiðingin bleiv almannakunngjørd, tá grannskoðarin hevði hugt eftir tølunum. Hetta tók nevndin undir við.

Eftir ynski frá nýggju partaeigarunum í Eik Banka, TF-holding, bleiv frágreiðingin tó ongantíð almannakunngjørd.

Men tað tykist ikki vera nakar ivi um, at báðir grannskoðararnir hjá Eik Banka, Spekt og KPMG, taka undir við tølunum í frágreiðingini. Tí í ársfrágreiðingini hjá Eik Banka fyri 2010-11, sum bæði KPMG og Spekt hava áteknað, stendur, at Eik Banki yvirtók skyldur, sum vóru 514 milliónir størri enn ognirnar frá gamla Eik Banka, og at byrjanarjavnin í nýggja bankanum tí var 1.486 mió. krónur. Júst somu tøl, sum stóðu í frágreiðingini "Eik í 2010", hava bæði Spekt og KPMG í øðrum almennum frágreiðingum sostatt góðkent.

**12. (14.26): At Eik Banki í dag ikki vil kennast við frágreiðingina hjá fyrsta stjóranum**

Talan er ikki um eina skeiva upplýsing.

Rættingin hjá Eik Banka í teirra kæru - *"Eik hevur onga slíka frágreiðing greitt úr hondum"* - stuðlar júst uppáhaldinum í sendingini: nevniliga, at Eik ikki vil kennast við hesa frágreiðing í dag.

Sum greitt frá omanfyri, so var undanfarna nevndin í Eik Banka so mikið samd í hesi frágreiðing, at tað bleiv samtykt, at frágreiðingin skuldi almannakunngerast, tá grannskoðarin hevði hugt eftir tølunum. Men núverandi leiðslan hevði – og hevur – eina heilt aðra støðu til frágreiðingina. Nevniliga, at mann ikki vil kennast við innihaldið í frágreiðingini.

**13. (15.39): At Eik Banki í dag ikki vil kennast við eitt skjal hjá fyrsta Eik Banka-stjóranum um skattligu treytirnar hjá Eik Banka**

Talan er ikki um eina skeiva upplýsing.

At Eik Banki í síni kæru vísir á, at skjalið ikki finst í skjalagoymsluni hjá bankanum, er ein staðfesting av uppáhaldinum í sendingini.

(Kringvarpið er annars vitandi um, at skjalið er sent til nevndarformannin í Eik Banka, Torben Nielsen, tvær ferðir, og tí burdi skjalið ikki verið ókent fyri Eik Banka)

**14. (16.08): Lestur um, at Eik Banki broytti støðu til síni skattligu viðurskiftir, tá nýggj nevnd og leiðsla tók yvir**

Talan er ikki um eina skeiva upplýsing.

Tað er eitt óreingiligt fakta, at fyrsta leiðslan fyri Eik Banka við Jørn Astrup Hansen sum stjóra og Henrik Bjerre-Nielsen sum nevndarformanni ikki hevði somu fatan av skattligu viðurskiftunum hjá Eik Banka sum núverandi bankaleiðslan. Fyrsta leiðslan helt, at skattligu viðurskiftini vóru á ein hátt, meðan núverandi leiðsla heldur, at tey eru á ein annan hátt.

**15.( 18.30): Lestur um, at Henrik Barner úr KPMG ikki tók undir við, at Eik Banki kannaði sær skattafrádráttin fyri tapið á eina hálva milliard**

Talan er ikki um eina skeiva upplýsing.

Henrik Barner frá KPMG var ikki samdur í tí, sum Eik Banki hevði gjørt í síni sjálvuppgávu. Nevndarformaðurin hjá Eik Banka, Torben Nielsen, hevur váttað hetta fyri Berlingske Business.

Eik Banki hevur fyrr roynt at føra fram í skrivi til almenningin, at KPMG skal hava tikið undir við tí, sum bankin hevði gjørt. Hetta hevði við sær, at KPMG kravdi, at Eik Banki tók hetta aftur.

**16. (20.45): Lestur um, at Eik Banki sambært almenna roknskapinum byrjaði við 1,5 milliard í eginpengini**

Talan er ikki um eina skeiva upplýsing.

Sambært forsíðuni á almenna roknskapinum hjá Eik Banka byrjaði Eik Banki sítt virksemi 12. oktober 2011. Hendan dagin var eginognin hjá bankanum 1.486 mió. krónur sambært almenna roknskapinum fyri 2010/11.

Annars er tað sera marghháttiligt, at Kringvarpið skal vísa leiðsluni í Eik Banka á, hvat stendur í almenna roknskapinum hjá bankanum, og at hetta ikki eru skeivir upplýsingar. Vónandi – serliga fyri Eik Banka – eru almennu roknskapirnir rættir.

**17. (22.59): Lestur um, at støðan hjá Eik Banka er eindømi**

Talan er ikki um skeiva upplýsing.

Eik Banki vísir á, at støðan í Fionia Bank var *"á leið tann sama"*, og tí er Eik Banki ikki eitt eindømi. Her er týdningarmikið at bíta merki í orðini "*á leið*". Tí hóast nógv var felags, so var støðan hjá Fionia Bank og Eik Banka ikki tann sama.

Eik Banki er *einasti* bankin, sum Fíggjarligt Støðufesti (endur)stovnaði sum eitt nýtt felag, sum skuldi reka virksemi hjá gamla bankanum víðari.

Støðan við Fionia Bank var ikki tann sama. Í sambandi við bjargingina av Fionia Bank setti Fíggjarligt Støðufesti hybrydan kjarnukapital - ikki eginpening - í Fionia Bank. Ein partur av útlánunum hjá Fionia Bank blivu avhendað til eitt dótturfelag hjá Fíggjarligum Støðufesti, Nova Bank A/S. Seinni bleiv Fionia Bank seldur til Nordea.

Í mun til gamla Eik Banka fór Fionia Banki sostatt ikki á húsagang. Og tað er ein avgerandi munur í hesum sambandi. Tá eitt felag fer á húsagang og verður avtikið, fella allir møguligir skattafrádráttir ella rokningar burtur. Men í mun til gamla Eik Banka, fór Fionia Bank ikki á húsagang, og tí kundi nýggi eigarin av Fionia Bank, Nordea, brúka skattafrádráttirnar í Fionia Bank.

**18. (25:13): Lestur um, at hóttanir vóru frammi á nevndarfundum**

Talan er ikki um skeiva upplýsing.

Sambært Sprotanum merkir *"at hótta"* eitt nú "*at noyða við hørðum ágangi ella ræðingum"*.

Tá tað verður skrivað í fundarfrásagnirnar, at nevndarlimir kunna ábyrgdast, um teir forða fyri, at Eik Banki fær ein skattafrádrátt, kann hetta valla skiljast sum annað enn eitt slag av hóttan. Ein ræðumynd verður málað fyri nevndarlimunum, sum sjálvsagt kenna seg trýstar av, at teir kunna ábyrgdast fyri eitt tap á næstan 100 milliónur krónur.

Journalisturin ger eitt “value judgement” – eina sakliga meting – av, at tá nevndarlimir fáa at vita, at teir kunna ábyrgdast, tá er hetta ein hóttan. Hetta hava keldurnar hjá Kringvarpinum eisini váttað fyri okkum.

Talan er tí ikki um skeiva upplýsing, men eina sakliga og væl undirbygda niðurstøðu hjá journalistinum.

Tað er eisini undrunarvert, at Eik Banki í kæruni skrivar, at tað verður sakliga greitt frá hesum í nevndarfrágreiðingini. Tí tá Kringvarpið skrivaði til Súna Schwartz Jacobsen í sambandi við sendingina, kendi bankastjórin einki til, at nevndarlimir fingu at vita, at teir kundu ábyrgdast, um teir forðaðu fyri, at bankin fekk ein frádrátt. 17. mai 2016 skrivar bankastjórin: “Eg kenni ikki hesa støðuna aftur”.

**19. (27.32): At Súni Schwartz Jacobsen situr yvir nevndini í Eik**

Talan er ikki um skeiva upplýsing.

Tað er eitt faktum, at Súni Schwartz Jacobsen er stjóri í TF-Holding, sum eigur Eik Banka. Sum stjóri í TF-Holding er Súni Schwartz Jacobsen fastur skrivari í øllum setanarbólkum til nevndarsessir í TF-samtakinum. Tí er ikki skeivt at siga, at Súni Schwartz Jacobsen situr yvir nevndini í Eik Banka.

**20. (28:24) Lestur um, at tað er fleiri feløg við nevndarsessum í TF-samtakinum**

Talan er ikki um skeiva upplýsing.

Tað *eru* fleiri feløg í TF-samtakinum – enntá fleiri enn tað síggjast á skerminum í sendingini – og fleiri nevndarsessir eru í hesum feløgum.

At Eik Banki vísir á, at *øll* feløgini ikki hava nevndarsessir, og at *nakrir* av nevndarsessunum verða mannaðir av starvsfólkum, merkir ikki, at tað er skeivt, at tað eru fleiri feløg í samtakinum við fleiri gyltum nevndarsessum.

**21. (31.59) Eik Banki vísir TAKS á ein fyribils byrjunarjavna**

Talan er ikki um skeiva upplýsing.

Eik Banki vísir á, at TAKS 16. apríl 2014 spyr eftir “*m.a. avrit av yvirtøkujavna pr. 30. september 2010”* og at *“TAKS bað í sama viðfangi eisini um onnur skjøl”*.

TAKS spyr nevniliga (m.a.) Eik Banka um, hvat handilsvirðið á yvirtiknum ognum og skyldum var. Sum greitt verður frá í sendingini, svarar Eik Banki aftur við at vísa á ein “preliminary opening balance sheet”, ein fyribils byrjanarjavna, tá eginognin er 2.024 mió. krónur. Í sendingini verður spurnartekin sett við, hví Eik Banki velur á vísa á, hvørjar ognur og skyldur vóru sambært *fyribils byrjanarjavnanum* og ikki sambært endaliga byrjanarjavnanum.

Eik Banki kærir í hesum føri um, at *"journalisturin ger í sendingini eina fakliga niðurstøðu um, hvør rætti byrjanarjavnin er. Sjálvur hevur journalisturin ongar førleikar at gera slikar niðurstøður"*.

Enn einaferð eru vit í tí margháttiligu støðu, at Eik Banki setur spurnartekin við tað, sum stendur í almenna roknskapinum hjá bankanum. Tað er ikki neyðugt at vera løggildur grannskoðari fyri at duga at lesa, hvat byrjanarjavnin hjá Eik Banka er sambært almenna roknskapinum. Sambært almenna roknskapinum var eginpeningurin sambært byrjanarjavnanum 1.486 mió. krónur. At Eik Banki nú setur spurnartekin við, hvørt hetta er rætti byrjanarjavnin ella ikki, er ómetaliga undrunarvert.

Ikki minst, tá lagt verður afturat hesum, at Súni Schwartz Jacobsen í samrøðu við Jan Lamhauge til Dag & Viku, 18. februar 2016, váttar, at eginpeningurin sambært byrjanarjavnanum var hálv onnur milliard krónur, og at hetta hevur Eik Banki kunnað TAKS um. Kringvarpið hevur enntá upptøkur, har Súni Schwartz Jacobsen á sínum egna teldli vísir Jan Lamhauge á byrjanarjavnan hjá bankanum. Men nú setur Eik Banki spurnartekin við bæði trúvirðið á egnum roknskapum og á útsagnirnar hjá Súna Schwartz Jacobsen.

**22. (32.44): Barbara Holm sigur, at týðandi upplýsingar vóru ikki latnir TAKS**

Talan er enn einaferð ikki um skeivar upplýsingar.

Barbara Holm hevur í sínum greinum argumenterað væl fyri, at hon undrast yvir, at Eik Banki ikki lýsti málið betur fyri TAKS. Sum vit áður hava víst á, so hevur Eyðun Mørkøre váttað í Degi & Viku, 26. mai 2016, at nógvir nýggir upplýsingar eru komnir fram, sum ikki vóru við í fyrru viðgerðini, og tí verður málið viðgjørt eina ferð afturat.

**23. (34.23): Lestur um, at nevndin var væl nøgd, tá avgerðin kom frá TAKS, sum játtaði Eik Banka millióna skattalættan**

Av misgávum stendur á grafikkinum í sendingini, at tað var í juni 2015, at avgerðin hjá TAKS bleiv umrødd á nevndarfundi í Eik Banka. Tað er ein feilur. Tað var á nevndarfundi í august 2015, at avgerðin varð umrødd. Kringvarpið hevur rættað dagfestingina á heimasíðuni Kringvarpsins og í Degi og Viku 18. august 2016. Talan er tó bert um skeiva dagfesting, sum ongan týdning hevur fyri málið annars, og tí ger Kringvarpið ikki fleiri rættingar burturúr hesum.

Eik Banki vísir á, at einki stendur í nevndarfrágreiðingini um, at *"stjórin hevur uppiborið rós"* og *"einki verður nevnt um stóran vinning"*. Eik Banki lesur her sínar nevndarfrágreiðingar heilt bókstaviliga. Eik Banki vísir á fundarfrágreiðingina, har tað stendur skrivað, at grannskoðaranevndin er væl nøgd við, at bankin hevði hildið fast um sína støðu. Sum ein journalistisk endurgeving kann hetta kallast rós til bankastjóran. Avgerðin hjá TAKS merkir, at Eik Banki sleppur undan at rinda umleið 100 milliónir krónur í skatti. Hetta kann av røttum kallast stórur vinningur.

**24. (35.28): Lestur um, at innanhýsis grannskoðarin segði upp.**

Í sendingini verður sagt, at innanhýsis grannskoðarin segði seg úr starvi. Hetta kann geva hyggjarunum ta fatan, at bert *ein* innanhýsis grannskoðari er í bankanum. Tað hevði tí verið rættari at sagt, at “*ein av innanhýsis grannskoðarunum segði upp”.* Kringvarpið hevur presiserað hetta í Degi og Viku 18. august 2016 og á heimasíðu Kringvarpsins.

Talan er tó bert um eina presisering, sum ongan týdning hevur fyri málið annars, og tí ger Kringvarpið ikki meira burturúr hesum.

**25. (40:07) Lestur um, at Eik Banka-stjórin villeiddi í Degi & Viku, 15. apríl 2016**

Talan er ikki um skeiva upplýsing.

Í Degi & Viku verður Súni Schwartz Jacobsen spurdur, hví Eik Banki ikki kunnaði TAKS um støðuna hjá grannskoðarunum hjá bankanum. Súni Schwartz Jacobsen svarar aftur, at tá tað kom fram, at grannskoðararnir ikki tóku undir við, at bankin hevði rætt til frádráttin, avgjørdi nevndin at venda sær aftur til TAKS, 26. januar í ár. Hetta *er* ein villeiðandi frágreiðing. Tí KPMG søgdu longu í mars 2013, at skattafrádrátturin ikki var lógligur sambært danskari lóg. Spekt søgdu í uppriti frá mars 2014, at Eik Banki neyvan hevði rætt til skattafrádráttin, hvørki sum rakstartap í einum ella sum goodwill yvir 10 ár.

Tí er tað heilt einfalt ikki satt, tá Eik Banki førir fram, at hesi ivamál – tey sum grannskoðararnir vístu á frá mars 2013 – vóru tað, sum Eik Banki spurdi TAKS um. Eik Banki umrøddi bara møguleikan “skal tapið dragast frá yvir 1 ella 10 ár”. Eik Banki umrøddi **ongantíð** møguleikan fyri TAKS, at “kanska er hetta als ikki eitt tap hjá Eik Banka”. Og hendan møguleikan umrøddu grannskoðararnir væl og virðiliga áðrenn januar 2016. Umframt at hetta bleiv útgreinað fyri TF-Holding væl og virðiliga líka frá tí fyrsta fundinum millum Fíggjarligt Støðufesti og TF-Holding um møguleikan at keypa Eik Banka 5. oktober 2010.

Talan er ikki um skeiva upplýsing, tá hetta verður kallað “villeiðing”. Hetta er ein væl grundað saklig niðurstøða hjá journalistinum.

**26. (40.50): Lestur um, at frásagnin hjá Eik Banka-stjóranum ikki samsvarar við veruleikan.**

Talan er ikki um skeiva upplýsing. Sí omanfyri.

**27. (43.04) Víst verður á fráboðanir til Eik Banka áðrenn januar 2016.**

Tað er ikki ójavnvág í viðgerðini.

Sendingin umrøður her allar tær fráboðanir, sum Eik Banki fekk *áðrenn januar 2016* um, at tað sum bankin gjørdi ikki var í tráð við lógina, og at tað var týdningarmikið, at kunningin til TAKS var so greið sum gjørligt.

Víst verður á fráboðanina hjá KPMG frá mars 2013, uppritið frá Spekt frá mars 2014 og ein teldupost frá Jørn Astrup Hansen frá mars 2014.

Í veruleikanum ger Kringvarpið í hesum føri ov lítið burturúr, tí eftir sendingin var send, hevur Kringvarpið fingið tilfar, sum vísur á uppaftur fleiri fráboðanir, sum Eik Banki/TF- Holding fingu longu í oktober 2010, um at tapini og ein møguligur skattafrádráttur hoyrdu til gamla Eik Banka og Fíggjarligt Støðufesti.

Í kæruni eftirlýsir Eik Banki, hví tað ikki verður víst á eitt upprit frá Deloiette. Men hetta uppritið er frá apríl 2016, og kann tí ikki brúkast av Eik Banka sum grundgeving fyri, hví bankin ikki avgjørdi at kunna TAKS um viðkomandi ivamálini fyrr enn í januar 2016.

**28. (43:03): Lestur um, at Eik villeiddi bæði TAKS og almenning**

Talan er ikki um skeiva upplýsing.

Kringvarpið hevur prógført nóg væl fyri hesum. Sí omanfyri.

Afturat tí, sum verður nevnt omanfyri, kemur sendingin eisini inná, at Eik Banki 19. apríl 2016 sendi almenninginum eitt skriv við yvirskriftini “Rættleiðing til mistøk í Degi og Viku”. Í skrivinum skrivar Súni Schwartz Jacobsen:

*“Í Degi og Viku mánakvøldið 18. apríl varð ført fram, at KPMG í 2013 segði, at í Danmark hevði Eik ikki fingið ein frádrátt fyri undirbalansuna í sambandi við yvirtøkuna av virkseminum frá gamla Eik. Í sendingini varð valt at steðga við eitt komma, sum hevði vent søguni 180 stig”.*

At okkurt vendur 180 stig merkir, at tað mótsatta er galdandi. Um søgan – at KPMG ikki tók undir við, at Eik Banki fekk ein skattafrádrátt fyri undirbalansuna í gamla Eik Banka – vendur 180 stig, verður søgan, at KPMG metti, at tað var í tráð við danska lóggávu, at Eik Banki fekk skattafrádrátt fyri undirbalansuna í gamla Eik Banka. Hetta var sostatt tað, sum Eik Banki vildi billa almenninginum inn við tíðindaskrivinum 19. apríl 2016.

Hetta var ikki eitt smávegis djarvt uppáhald. KPMG er grannskoðari hjá Fíggjarligum Støðufesti, og hevur góðkent tølini, sum eitt nú verða nýtt í almennu frágreiðingunum hjá Fíggjarligum Støðufesti, har tapið á ein hálva milliard krónur verður roknað upp í óavmarkaðu statsveðhaldið, sum gamli Eik Banki var partur av. Harumframt hevur nevndarformaðurin í Eik Banka, Torben Nielsen, váttað fyri Berlingske Business, at KPMG var ímóti tí, sum Eik Banki hevði gjørt í sínum sjálvuppgávum.

Tí átti tað ikki at yvirraska nakran, at KPMG kravdi, at Eik Banki tók skrivið frá 19. apríl 2016 aftur. Heilt einfalt, tí talan var skeiva upplýsing. Talan var villeiðing av almenninginum.

**29.(47:28): Lestur um, at skulu vanligu meginreglurnar vera galdandi, tykist bert at vera tveir møguleikar: antin fær Eik Banki skattafrádráttin ella endar málið hjá ákæruvaldinum**

Vit duga ikki at síggja, hvat Eik Banki ítøkiliga finnist at. Kringvarpið hevur víst á, hvørjar lógir eru galdandi á økinum. Journalistiska niðurstøðan av hesum er, at *antin* fær Eik Banki skattalættan *ella* endar málið hjá ákæruvaldinum. Hetta er ein saklig meting hjá journalistinum.

Metingin hjá journalistinum byggir á rundskriv nr. 7 hjá TAKS frá 10. november 1998, sum sigur, at tá talan er um eina upphædd, sum er størri enn 100.000 krónur, *"kann málið ikki avgerast fyrisitingarliga"*. Tað er hetta journalisturin vísir á, áðrenn hann kemur til sína niðurstøðu. Hetta er ein saklig niðurstøða.

**30. (46.37): Súni Schwartz Jacobsen vil ikki svara spurningum um egið tíðindaskriv**

Myndirnar av bankastjóranum, sum ikki vil svara uppá spurningar um sítt egna tíðindaskriv, og hví hetta var tikið aftur, vísa ein bankastjóra, sum ikki vil greiða frá, hví hansara egnu almennu skriv verða tikin aftur. Hetta eru týdningarmiklar myndir at vísa.

Tað at journalistar møta upp, har sum valdshavarar eru fyri at seta teimum spurningar er als ikki óvanligt. Ein tann kendasta og mest brúkt fjølmiðlamyndin úr Danmark, er tá journalistar "fanga" politikarar á gongunum á Christiansborg. Eisini hevur virðislønta svenska dokumentarrøðin "Uppdrag Granskning" hjá SVT gjørt líknandi upptøkur við IKEA-stjóranum, Ingvar Kamprad, uttanfyri eina IKEA-verksmiðju. Hetta er at kalla fastur táttur í sendingum sum "Kontant" á DR, "Panorama" hjá BBC og áðurnevndu "Uppdrag Granskning" hjá SVT.

At gera samrøður uttan eina avtalu er sjáldan fyrsta val hjá journalistinum. Men í hesum førinum hevði Kringvarpið roynt at fáa eina samrøðu við Súna Schwartz Jacobsen í fleiri dagar. Men onki svar kom, hóast bankastjórin sjálvur hevði sent almenninginum tíðindaskriv um skattamálið. Dagin eftir var hetta skriv tikið aftur, og stjórin vil als ikki greiða almenninginum frá hví so var.

Kringvarpið tekur ikki undir við, at talan er um "óvirðiliga og óprofessionellan atburð". Hetta er ein arbeiðsháttur, sum er viðurkendur og nógv brúktur av journalistum kring allan heim. Sum ein av Føroya valdmiklastu persónum, eigur bankastjórin at tola kritiskan og áhaldandi journalistik. Tá bankastjórin sjálvur sendur almenninginum skriv, eigur hann at kunna svara spurningum um hesi skriv.

At krevja, at fjølmiðlarnir skula gloyma hesi skriv og halda seg burtur, tá skrivini verða tikin aftur, er púra burturvið. At vísa á merkverdigu atferðina hjá stjóranum í Føroya ríkasta samtakið, er sakligur og viðkomandi journalistikkur.

**31.(48.29) Endaskelti sigur, at Súni Schwartz Jacobsen vildi ikki gera samrøðu til sendingina**

Tað er faktuelt rætt, at Súni Schwartz Jacobsen ikki vildi gera samrøðu til sendingina "Skattamálið".

Eik Banki kærir um, at einki verður nevnt um, at Eik Banki hevur svarað skrivliga uppá spurningar frá journalistinum. Tað er ikki rætt. Tað bleiv nevnt av vertinum í Degi & Viku áðrenn sendingina, og øll svarini í síni heild vórðu løgd á heimasíðuna hjá Kringvarpinum longu áðrenn sendingin varð send í sjónvarpinum.

**Brot á leiðreglurnar**

Eik Banki vil vera við, at Kringvarpið hevur brotið punktini 1.2, 3.2, 4.1 og 4.12 í leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið. Niðanfyri gjøgnumganga vit hesi punktini í leiðreglunum.

**1.2:**

Punkt 1.2 í leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið er soljóðandi:

***Fjølmiðlar eiga at bera tíðindi, upplýsa, kunna, íbirta orðaskifti og at viðgera samfelagslig mál kritiskt. Fjølmiðlar hava tí serstaka ábyrgd av, at øll viðkomandi sjónarmið verða lýst.***

Fjølmiðlarnir í einum fólkaræði hava sambært Altjóða Mannarættindarsáttmálnum eitt sera víðgangandi útsagnarfrælsi. Fjølmiðlarnir hava skyldu sum "pubic watchdog" at varpa ljós á týðandi samfelagslig mál og at viðgera hesi kritiskt. Verður hetta frælsið avmarkað, krevur tað sera góðar orsøkir.

Skattamálið hjá Eik Banka er júst eitt tílíkt týðandi samfelagsligt mál, sum fjølmiðlar sum "public watchdog" eiga at viðgera. Skorið inn á bein, so snýr málið seg um at kanna, hvussu tað bar til, at TAKS á sumri 2015 gav Eik Banka skattafrádrátt, sum svarar til eina upphædd á næstan 2.000 krónur frá hvørjum einasta føroyingi. Samfelagsligi týdningurin kundi tí illa verið størri enn í hesum málinum.

Kringvarpið er tí als ikki samt við Eik Banka, tá bankin í kæruni kallar hetta eitt trúnaðarmál, "sum bankin ikki hevur skyldu at viðgera í fjølmiðlunum". Vil bankin hava eina skattafrádrátt, sum svarar til 2.000 krónur í part frá øllum føroyingum, er talan um eitt fyri almenningin týdningarmikið mál, sum Eik Banki burdi kent sum sína skyldu at greiða almenninginum frá, *hvørja ferð* bankin fekk ein fyrispurning um málið.

Eik Banki førir fram í kæruni, at bankin hevur roynt eftir førimuni at svara almenninginum, men at Eik Banki í hesum førinum ikki vildi luttaka í sendingini, tí bankin ikki hevði álit á journalistinum, t.e. Jan Lamhauge. Kringvarpið heldur, at hetta uppáhald er veikt. Tí Eik hevur júst somu støðu mótvegis Barbaru Holm í Miðlahúsinum, sum Eik Banki ongantíð hevur viljað svarað spurningum frá, men sum bankin eisini hevur kært til Fjølmiðlanevndina. Tað sama var eisini galdandi í mars mánaði, tá ein annar journalistur í Kringvarpinum, Svein Magnason, í fleiri umførum royndi at fáa viðmerkingar frá Súna Schwartz Jacobsen til Dag & Viku. Tá vildi bankastjórin heldur ikki gera bandaða samrøðu við journalistin. Okkum lystir eisini at vita, um sama misálit er galdandi fyri donsku starvsfelagarnar á Berlingske Business, TV2 og Danmarks Radio?

Myndin tykist greið: er talan um kritiskan journalistik, so vil Eik Banki ikki luttaka.

At Eik Banki - uttan sakliga grundgeving – ikki vil gera samrøðu til sendingina er sjálvandi ein avbjóðing fyri Kringvarpið. Leiðreglurnar fyri góðan fjølmiðlasið vísa tó fleiri ferðir á, at fjølmiðlar eiga ikki gevast við at varpa ljós á týðandi samfelagsviðurskifti bert tí onkur ynskir, at málið ikki verður viðgjørt ella tí onkur heimild/kelda ikki vil luttaka.

Leiðreglurnar siga eitt nú:

*1.3 Fjølmiðlar skulu verja talu-, skrivi- og kunningarfrælsið. Fjølmiðlar eiga tí ikki at lata óviðkomandi áhugamál forða frælsari kunning, frælsari atgongd at heimildum ella forða orðaskifti um samfelagslig mál ella viðurskifti.*

*2.1 Tað áliggur øllum fjølmiðlum og tí einstaka fjølmiðlafólkinum at verja integritetin og trúvirðið, so arbeiðast kann uttan trýst frá einstaklingum ella bólkum, sum av politiskum, fíggjarligum ella øðrum orsøkum kunnu hugsast at vilja ávirka innihaldið.*

*4.13 Persónar, ið verða ákærdir, eiga, um tað á nakran hátt ber til, at sleppa at svara aftur samstundis, tá ið tað snýr seg um ítøkiligar upplýsingar. Orðaskifti, atfinningar og tíðindaflutningur eiga ikki at verða forðað av, at partar ikki vilja bera fram hugsan sína ella luttaka í orðaskifti.*

Í hesum førinum valdi Eik Banki ikki at gera samrøðu til sendingina. Í einum so týðandi máli eigur hetta ikki at steðga tíðindaflutninginum, tí atlitið at upplýsa almenningin vigar tyngri enn væntandi luttøkan hjá Eik Banka.

Kringvarpið valdi tó at senda Eik Banka fleiri spurningar, soleiðis at bankin kundi svara uppá atfinningarnar, sum koma fram í sendingini. Hesi svar blivu løgd út á heimasíðuna hjá Kringvarpinum, áðrenn sendingin var send, og verturin í Degi & Viku kunnaði hyggjaran um, at svarini lógu á heimasíðuni hjá Kringvarpinum beint áðrenn sendingin varð send í sjónvarpinum.

Men tílík skrivlig svar liva á ongan hátt upp til krøvini, ein vanliga setur til eina kritiska samrøðu. Hetta tykist Eik Banki eisini vita. Tí í síni kæru kærir bankin eisini um, at Jørn Astrup Hansen ikki verður royndur í einari kritiskari samrøðu “við ágangandi og atfinningarsomum spurningum”. Eik heldur eftir øllum at døma, at tað er rímiligt, at Kringvarpið er ágangandi og atfinningarsamt *móti øðrum*, sum skula svara fyri skattaviðurskiftini hjá Eik Banka. Men sjálvur vil bankin bert svara skrivliga.

Fyrimunurin við hesum – at svara skrivliga heldur enn í samrøðu – fyri tann, sum skal svara fyri seg, er, at journalisturin ongan møguleika hevur at bróta av, at vísa á skeivleikar ella at spyrja uppaftur, um tann, sum svarar, svarar uttanum.

Hetta seinasta – at svara uttanum – verður eisini gjørt í fleiri av skrivligu svarunum frá Eik Banka. Tá Kringvarpið sendi Eik Banka uppfylgjandi skrivligar spurningar, var svarið, at bankin ikki vildi svara, tí bankin metti seg hava svarað “nøktandi og fullfíggjað”.

Eik Banki svarar, sum honum lystir, og finnur seg ikki í uppfylgjandi spurningar. Hetta skrivliga samskiftið livir tí á ongan hátt upp til at luttaka í einari kritiskari samrøðu við “ágangandi og atfinningarsomum spurningum”. Tí  ber sjálvsagt heldur ikki til hjá Kringvarpinum at brúka hesi skrivligu svarini sum ein haldgóðan avloysara fyri kritisku samrøðuni í sendingini.

Harumframt eru beinleiðis skeivleikar í skrivligu svarunum frá Eik Banka. Hevði Kringvarpið tí havt svarini ókritiskt við í sendingini, hevði hetta tí ikki bara drigið sendingina út, men tað hevð ikki upplýst hyggjaran.

Í avmarkaðan mun blivu skrivligu svarini frá Eik Banka, umframt aðrar samrøður við Eik Banka/TF-Holding, tó brúkt í sendingi – t.d.: 3.28-4.57; 4.40-14.48;15.38-15.49; 30.47-31.19; 39.58-40.48; 41.36-41.56 –

soleiðis at sjónarmiðini hjá Eik Banka eisini verða hoyrd í tann mun, sum Kringvarpið metti, at tað var hóskandi. Og tað er altíð Kringvarpið, sum eigur hesa metingina. Tað er altíð miðilin, sum eigur redigeringsrættin – ikki heimildin/keldan.

Kringvarpið metir seg tí ikki hava brotið 1.2 í leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið. Kringvarpið hevur livað upp til sínar skyldur at viðgera "Skattamálið" kritiskt, og Eik Banki hevði fingið møguleikan at bera síni sjónarmið fram.

**3.2:**

Punkt 3.2 í leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið er soljóðandi:

***Tað er góður fjølmiðlasiður at vera vandin í valinum av heimildum, og at eftirkanna, at upplýsingar frá heimildum eru rættar. Eisini er tað góður fjølmiðlasiður at stremba eftir fjølbroytni í valinum av heimildum. Heimildarvandnið herðist, um dulnevndar heimildir verða nýttar, ella um ein heimild gevur fjølmiðli einkarætt.***

Kringvarpið hevur fleiri góðar keldur í "Skattamálinum". Fyri at verja keldurnar var tó valt, at keldurnar skuldu vera loyniligar.

Kringvarpið metti eisini, at søgan í "Skattamálinum" kundi sigast eins væl uttan ov nógvar samrøður og persónar, men heldur við fokusi á skjølini í málinum.

Hetta var eitt nú gjørt, tí at Eik Banki í alt ov stóran mun hevur gjørt "Skattamálið" til eitt persónsmál, sum fyrrverandi stjórin í Eik Banka, Jørn Astrup Hansen, eina og aleina skal standa aftanfyri. Hesin hugburður sæst eisini aftur í kæruni til Kringvarpið.

Tað tykist, sum Eik Banki ikki vil viðurkenna ta sannroynd, at *allir* partarnir, sum vóru íblandaðir, tá gamli Eik Banki bleiv yvirtikin og nýggi bankin stovnaður, hava fatanina, at tapið á eina hálva milliard krónur hoyrdi til gamla bankan. Nevndarformaðurin í gamla Eik Banka, Odd Bjellvåg, hevur hesa fatan. Stjórin í Fíggjarligum Støðufesti og fyrrverandi nevndarformaðurin í Eik Banka, Henrik Bjerre-Nielsen, hevur hesa fatan. Og fyrsti stjórin í nýggja Eik Banka, Jørn Astrup Hansen, hevur hesa fatan. Allir hesir hava úttalað seg um málið, og hava somu fatan.

Hendan fatan sæst eisini í almennu frágreiðingunum hjá Fíggjarligum Støðufesti, har tapið hjá gamla Eik Banka á 514 milliónur krónur verður roknað upp í óavmarkaðu statsveðhaldið, sum gamli Eik Banki – ikki nýggi Eik Banki (Eik Banki Føroya) - var partur av. Fíggjarligt Støðufesti hevur sent hesa rokning víðari til bankarnar í Bankapakka 1. Hesir bankar (harímillum eisini Eik Banki) hava drigið sítt gjald til Bankapakkan frá í skatti.

Sum Odd Bjellvåg vísir á í Sosialinum, 10. juni 2016, so er leiðslan fyri gamla Eik Banka eisini stevnd eftir endurgjaldi fyri millum annað tapið á hesu somu umrøddu 500 mió. Advokaturin hjá Fíggjarligum

Støðufesti, Carsten Fode frá Kromann Reumert, hevur sostatt eisini fatanina, at tapið hoyrdi til gamla Eik Banka.

Eik Banki tykist eisini hava gloymt, at tá Jørn Astrup Hansen í februar 2011 legði frágreiðingina "Eik í 2010" fyri nevndina í bankanum, samtykti nevndin, at hendan frágreiðing skuldi almannakunngerast, tá grannskoðararnir høvdu góðkent tølini. Fyrsta nevndin í Eik Banka var tí samd við Jørn Astrup Hansen.

Eik Banki tykist eisini gloyma – ella ikki vilja viðganga – at bankin hevur havt tveir grannskoðarar, KPMG og Spekt. *Hvørgin* av hesum fyritøkunum tók undir við tí, sum Eik Banki gjørdi í sínum sjálvuppgávum.

Tað er tí misvísandi, tá Eik Banki í kæruni skrivar, at tað er sjónarmiðið hjá Jørn Astup Hansen "sum áhaldandi ganga aftur".

Rættari hevði verið at sagt, at afturvendandi sjónarmiðið er "sjónarmiðið hjá pørtunum, sum gjørdu avhendingaravtaluna 30. september 2010, hjá Odd Bjellvåg, hjá gamla Eik Banka, hjá fyrstu nevndini hjá nýggja Eik Banka, hjá Fíggjarligum Støðufesti, hjá bankunum í Bankapakka 1, hjá SKAT, Henrik Bjerre-Nielsen, Jørn Astrup Hansen, Carsten Fode, Kromann Reumert, KPMG og Spekt". Um tapið á tær 500 mió. krónur veruliga ikki hoyrir til gamla Eik Banka, er tískil talan um ein risa stóran systematiskan feil.

Sum Odd Bjellvåg sigur í Sosialinum, 10. juni 2016: "*Um so er, at TAKS gevur Eik Banka viðhald í hesum málinum, so hevur Fíggjarligt Støðufesti ein trupulleika av teimum heilt stóru, og so skal Fíggjarligt Støðufesti til at rinda hasar 500 milliónirnar aftur til bankarnar í bankapakka 1 og minka kravið í stevningini móti gomlu leiðsluni í bankanum*".

At lítilsmeta hetta til "bara" at vera sjónarmiðið hjá "einum gomlum/súrum uppmærksomheitssøkjandi fyrrverandi stjóra", sum advokaturin hjá Eik Banka, Jógvan Páll Lassen, skrivaði í einum almennum skrivi, er púra burturvið.

At Kringvarpið hevur valt at halda sínar keldur loyniligar er í tráð við leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið, sum eitt nú siga:

*3.1 Tað eigur at vera upplýst, hvør heimildin er, um ikki fyrilit fyri heimildini ella fyrilitið fyri triðjaparti krevur annað.*

*3.4 Fjølmiðlarnir eiga at verja heimildirnar. Hetta er ein fyritreyt fyri, at fjølmiðlarnir kunnu inna teirra samfelagsábyrgd og tryggja atgongdina at týðandi upplýsingum.*

*3.5 Fjølmiðlafólk skulu ikki upplýsa navn á heimild, sum hevur latið upplýsingar í trúnaði, uttan so at greið avtala frammanundan er gjørd við viðkomandi frammanundan um hetta.*

Tað er ikki óvanligt, at fjølmiðlar nýta dulnevndar keldur. Hetta hevur verið gjørt líka frá Watergate og "Deep Throat" til nýggjari søgur frá Wikileaks og Panamaskjølunum. Í summum førum kunna søgurnar einans sigast við at nýta dulnevndar keldur, og fyri at verja keldurnar eiga fjølmiðlarnir at halda keldurnar loyniligar.

Í hesum førinum er talan um eitt mál, har fleiri av keldunum eru bundin av tagnarskyldu. Nógvir av almennu myndugleikunum mugu eisini vara seg fyri at úttala seg um málið, meðan málið verður kannað, tí tað kann blíva brúkt av Eik Banka ímóti teimum seinni.

Eik Banki hevur eisini verið óvanliga ágangandi í sambandi við, at málið gjørdist alment. Kringvarpið hevur bæði upplivað, at stjórin rópar illsinnisgleps eftir okkara starvsfólkum, tá tey standa uttan fyri bankan, løgreglan hevur verið tilkallað, tá vit hava tikið upp myndir av bankabygninginum yvir við Strond í Havn, starvsfólk hjá Eik Banka eru komin út at taka myndir av Kringvarpsstarvsfólkum, og advokaturin hjá Eik Banka, Jógvan Páll Lassen, hevur ringt til Kringvarpið við hóttanum um avleiðingar.

Barbara Holm greiður eisini frá í sendingini, at hon fleiri ferðir er uppringd av fólki í TF-høpi, sum ávara um, at hon skjótt kann verða meldað. Á afturlatnum fundi áðrenn aðalfundin hjá TF-Holding blivu øll umboð í umboðsráðnum kunnað um, at tað var sera ólógligt at tosa við fjølmiðlarnar um hetta málið. Harumframt fekk Jørn Astrup Hansen eisini bræv 15. juli frá einum advokati hjá Eik Banka, sum hótti við, at um Jørn Astrup Hansen ikki tók eina røð av útsagnum aftur innan ein mánað, so fór hann at vera stevndur.

Tá Eik Banki hevur gjørt tað so greitt, at tað fær avleiðingar, um ein luttekur í almennari umrøðu av málinum, tykist tað ikki sørt speisamt, at Eik Banki í kæruni skrivar, at tað er “undrunarvert”, at fleiri serfrøðingar ikki úttala seg í sendingini. Tá atferðin hjá Føroya ríkasta samtaki er so ágangandi sum í hesum førinum, sigur tað seg sjálvt, at fólk aftra seg við at standa fram alment. Og í einum tílíkum føri má Kringvarpið verja sínar keldur.

Innihaldið í “Skattamálinum” er tó grundað á fleiri fjølbroyttar keldur. Umframt samrøður við fleiri dulnevndar keldur, er sendingin grundað á tilfar frá gamla Eik Banka, Fíggjarligum Støðufesti, nýggja Eik Banka, TF-Holding, KPMG, Spekt og TAKS. Hetta eru allir teir týðandi partarnir í hesum máli.

Kringvarpið metur seg tí ikki hava brotið 3.2 í leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið. Tað er fjølbroytni í nýttu heimildunum, og Kringvarpið hevur skyldu og rætt til at verja sínar heimildir.

**Brot á 4.1:**

Punkt 4.1 í leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið er soljóðandi:

***Tað er góður fjølmiðlasiður, at innihald og framløgu eru saklig og umhugsað.***

Í sambandi við útsagnarfrælsi hjá fjølmiðlunum og góðan fjølmiðlasið er tað ein viðurkendur lutur, at tað er eitt øvugt lutfall millum atlitini hjá fjølmiðlunum og valdsstøðuna hjá teimum, sum verða umrødd. Tað er góður fjølmiðlasiður at vísa serliga stór atlit fyri fólki í sorg, børnum, sjúkum, osv. Tá talan er um leiðandi politikarar, leiðandi embætisfólk ella leiðandi vinnulívsfólk skula atlitini ikki vera eins stór. Tey, sum hava vald í samfelagnum, skula tola kritiska og nærgangandi fjølmiðlaumrøðu.

Eigarin av Eik Banka, TF-Holding, er Føroya ríkasta samtak. Tí eigur stjórin fyri Eik Banka, sum eisini er stjóri í TF-Holding, eisini at tola kritiska fjølmiðlaumrøðu.

Kringvarpið metur seg tí ikki hava brotið 4.1 í leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið. Innihaldið í "Skattamálinum" er væl dokumenterað, og stórur dentur er lagdur í, at tað verður miðlað sakliga.

Kringvarp Føroya metir seg tí ikki hava brotið pkt. 4.1 í leiðreglunum.

**Brot á 4.12:**

Punkt 4.12 í leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið er soljóðandi:

***Skeivar upplýsingar eiga at verða rættaðar skjótast gjørligt.***

Eik Banki nevnir í kæruni 31 skeivleikar í sendingini, sum eru gjøgnumgingnir omanfyri.

Í tveimum av hesum 31 punktunum er Kringvarpið samt við bankanum í, at Kringvarpið kundi havt orðað seg betur. Tí hevur Kringvarpið rættað hesar útsagnir bæði í Degi & Viku og á heimasíðuni hjá Kringvarpinum 18. august 2016. Hesar rættleiðingar hava tó ongan innihaldsligan týdning fyri sjálvt málið.

Í hinum 29 førunum er ikki talan um skeivleikar. Kringvarpið hevur hesar yvirskipaðu viðmerkingar til kærupunktini:

- Ein misskiljing, sum Kringvarpið heldur seg lesa í kæruni hjá Eik Banka, er, at Eik Banki blandar objektivitetskravið hjá fjølmiðlunum við eitt neutralitetskrav.

At journalistar skulu vera objektivir merkir ikki, at teir bara skula halda mikrofonini fyri stríðandi pørtunum í eini ósemju. Journalistar skula eisini eftirkannað tað, sum verður ført fram.

Eik Banki kærir fleiri ferðir um útsagnir, sum Jan Lamhauge, Barbara Holm ella upplesarin siga, og vísir á, at journalisturin hevur ikki fakligar førleikar til at siga hetta. Hesum er Kringvarpið ikki samt í. Til sendingina eru fleiri fakliga sterkar keldur brúktar, og kunnu journalistarnir gera sakligar metingar í sendingini.

Sum dømi førir Eik Banki fram, at tá gamli Eik Banki var yvirtikin bleiv ein virðismeting av gamla bankanum gjørd av Fíggjareftirlitinum. Fleiri onnur hava ført fram, at tað ikki er nøkur neyv virðismeting gjørd av gamla Eik Banka. Neutralur journalistikkur vildi kanska tikið bæði uppáhaldini við, sum vóru tey líka sonn. Men í hesum førinum hevur Kringvarpið heldur kannað útsagnirnar fyri at finna fram til, hvat er rætt av hesum báðum uppáhaldum. Rætta upplýsingin er tann, sum upplesarin í sendingini sigur: nevniliga at tað var ikki gjørd ein neyv virðisáseting av bókunum í gamla Eik Banka, tá hann varð yvirtikin. Uppáhaldið hjá nýggja Eik Banka er skeivt. Hetta er sakligur, objektivur journalistikkur.

Neutrala loysnin – at taka bæði uppáhaldini við, sum vóru tey líka haldgóð – hevði verið líkagyldigur og onkisigandi journalistikkur. Og týdningarmest av øllum, so hevði hetta ikki upplýst hyggjaran.

Tað sæst eisini aftur í kæruni, at Eik Banki ikki tykist skilja rættin hjá fjølmiðlum at gera "value judgements".

Evropeiski Mannarættardómstólurin hevur fleiri ferðir staðfest, at fjølmiðlar kunna gera sonevnd "value judgements" – tað vil siga, at journalisturin ger egnar kritiskar niðurstøður.

At journalistar skula vera objektivir, merkir ikki, at teir ikki kunnu vera hugsandi individ, sum gera kritiskar metingar av tí, sum verður ført fram.

Eitt kent dømi úr Føroyum er, tá fjølmiðlarnir søgdu, at Jørgen Niclasen hevði “snýtt í tolli”. Fjølmiðlarnir søgdu ikki hetta, tí at tað stóð orðarætt í nøkrum skjali hjá fútanum ella TAKS, men tí at fjølmiðlarnir gjørdu eina kritiska meting út frá fakta í málinum. Hetta var rætt av fjølmiðlunum, tað hevur Landsrætturin staðfest.

Eik Banki kærir eitt nú um, at tað verður sagt í sendingini, at hóttanir vóru frammi á nevndarfundinum hjá Eik Banka. Hetta verður sagt, tí tað var niðurskrivað í fundarfrágreiðingina fyri fundin 27. mars 2014, at nevndarlimir kundu ábyrgdast, um bankin ikki fekk frádráttin, um tað vísti seg, at bankin hevði rætt til hendan frádrátt. Tað sigur seg sjálvt, at tað verður ikki niðurskrivað í fundarfrágreiðingina “stjórin hótti”. Men í hesum førinum ger journalisturin ein sakliga meting – eitt “value judgement” – at tá nevndarlimir fáa at vita, at teir kunna ábyrgdast fyri 90 milliónir krónur, so er talan um eina hóttan.

At gera sakligar og sterkt orðaðar niðurstøður er ikki í stríð við góðan fjølmiðasið. Hetta verður gjørt av fjølmiðlum hvønn dag, og er ein týðandi partur av arbeiðnum at miðla søgur, soleiðis at móttakarin skilur tær.

Kringvarpið tekur í framhaldi av hesum heldur ikki undir við tí bókstavatrúgvu tilgongdini, sum Eik Banki hevur til næstan alt skrivligt tilfar, sum er í málinum.

Í sendingini verður eitt nú fleiri víst á, hvat er farið fram á nevndarfundum. Her grundar sendingin seg á bæði samrøður við okkara keldur og frágreiðingar á donskum máli frá fundum í Eik Banka. Eik Banki tykist hava eina sera bókstavatrúgva fatan av hesum fundum. Stendur tað ikki skrivað orðarætt, at Eik fekk ein stóran vinning av avgerðini hjá TAKS, so kærir Eik Banki um, at upplesarin sigur hetta.

Aftur tykist tað, sum Eik Banki blandar objektivitetskravið við eitt neutralitetskrav. Upplesarin kann væl koma útsøgnum, sum ikki eru orðarætt festar á blað av Eik Banka, uttan at tað er brot á góðan fjølmiðlasið. Tað avgerandi er, um tað, sum upplesarin sigur, er rætt. Og tað er tað í hesum førinum.

Tað er margháttligt, at kæran frá Eik Banka, sum roynir at vísa á skeivleikar í miðlingini hjá Kringvarpinum, í sær sjálvum er full av skeivleikum.

Tað mest undrunarverda í hesum, er, at Eik Banki fleiri ferðir sáar iva um trúvirðið á almennu roknskapirnar hjá Eik Banka, á tilfar, sum liggur á heimasíðuni hjá Eik Banka, á útsagnir hjá Súna Schwartz Jacobsen, stjóra osv.

Men tað gerst beinleiðis átaluvert, tá ein sær, hvussu nógv ósannindi eru í kæruni hjá Eik Banka. Givið er, at ein stórur partur av hesum snýr seg um viðurskiftir, sum fóru fram eitt hálvt ár, áðrenn Súni Schwartz Jacobsen hevði nakran formligan leiklut í Eik Banka. Men hetta kann tó ikki umbera, at Eik Banki førir fram skeivleikar so ofta, sum bankin hevur gjørt í hesum málinum.

Kæran til Kringvarpið má jú eisini tulkast sum ein roynd at ávirka tíðindaflutningin um málið, og má tí metast sum ein óbeinleiðis kunning til almenningin um málið.

Tá hugsað verður um høgu etisku krøvini, sum eru partar av lógunum um at reka bankavirksemi, er tað undrunarvert, at so nógvir skeivleikar eru í kæruni.

**Niðurstøða**

Kringvarpið metur seg hava gjørt tær presiseringar, sum eru neyðugar í málinum. Talan er um smávegis rættingar, sum á ongan hátt ávirka innihaldið og miðlingina av málinum.

Vit meta ikki, at Kringvarp Føroya hevur brotið leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið. Somuleiðis meta vit, at Eik Banki hevur fingið møguleika at svara, hvørja ferð vit hava umrøtt málið. Eik Banki fær tí ikki viðhald í síni kæru.

Gjørt verður vart við, at henda niðurstøða kann kærast til Fjølmiðlanevndina innan fýra vikur. Sí Løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2007, §34, stk.3.

Vinarliga

Liljan Weihe
Tíðindaleiðari
Kringvarp Føroya